


*Borgarstjórin í Runavík, Magnus Rasmussen, Tórbjørn Jacobsen, havnastjóri og Eli Lassen, oljustjóri bjóða oljuvinnuni at vera vælkomna á Skálafjørðinum, eisini tá olja verður funnin. Her eru teir í oljuútgerðarhavnini, har Viking Lady, útgerðarskipið liggur og bíðar eftir farmi.*
*Mynd Jan Müller*

# Vilja menna Skálafjørðin til landsins størsta kraftsentur

**KRAFTSENTUR** Allur Skálafjørðurin skal vera ein kommuna, sum við samstarvi og samanhaldi skal gera økið til landsins størsta kraftsentur við bæði fiskivinnu og oljuvinnu.

Jan Müller

Tað er neyvan ov nógv sagt, at Skálafjørðurin við sínum nógva og fjølbroytta vinnuvirksemi í dag er eitt kraftsentur í Føroyum. Men gongur tað sum teir tríggir, borgarstjórin í Runavík, Magnus Rasmussen, nýggi havnastjórin, Tórbjørn Jacobsen og stjórin á Føroya einastu oljuútgerðarhavn, Eli Lassen vilja tað, so fer allur Skálafjørðurin í framtíðini at vera landsins størsta kraftsentur. Hetta kom fram í eini temasending í Rás2 hósmorgunin millum klokkan 10 og 12, tá Jan Müller hitti teir tríggjar á havnaskrivstovuni í Runavík umframt at vitja umborð á útgerðarskipinunum Viking Lady, sum flytur góðs millum Runavík og boripallin West Phoenix á landgrunninum.

Tosað varð um at leggja allar kommunurnar saman í eina stóra kraftmikla kommunu við eitt nú fiskivinnu, alivinnu, oljuvinnu og skipasmíð. Oljuútgerðarstøðin er komin fyri at verða halda teir tríggir, sum síggja, at Skálafjørðurin sum tann náttúrhavn hann er eisini fer at vera tann rætti til at hýsa okkara oljuútgerðarhavn, tá olja møguliga er funnin og fund skulu útbyggjast til framleiðslu. Eisini komandi undirsjóvartunnilin fer at vera eitt týðandi lið í framtíðar menningini halda teir og leggja dent á, at tað einasta, sum kann forða fyri hesi náttúrligu menning er sundurlyndi og vantandi samstarvsvilji. Hoyrið í endursendingini millum 10 og 12 leygardagin teir tríggjar geva síni bestu boð uppá ta skilabestu framtíðina fyri Skálafjørðin.

*jan@sosialurin.fo*

## Norskur frálandaskipari:

# Góðar umstøður í Runavík

**ÚTGERÐARHAVN** Norðmenn eru sera væl nøgdir við umstøðurnar og tænasturnar í Runavík.

Jan Müller

Síðani seinast í juli mánað hevur serstaka supplyskipið Viking Lady verið partur av býarmyndini í Runavík. Skipið flytur alt tað góðs, sum verður brúkt umborð á boripallium West Phoenix, millum Runavíkina og pallin. Norski skiparin, Geir Ytreland, sum hevur verið í hesi vinnuni í góð 30 ár, er sera fegin um arbeiðsumstøðurnar í Runavík, har Atlantic Supply Base stendur fyri arbeiðinum at veita vørur og tænastur til pallin, sum í løtuni borar á landgrunninum.

– Eg skal viðganga, at eg varð sera skeptiskur, tá eg frætti, at vit skuldu til Føroya við okkara góða skipi, tí eg helt her bara vórðu steinbryggjur. Men nú vit hava brúkt havnina í Runavík og arbeitt saman við fólkinum her kann eg bara siga, at her eru sera góðar umstøður at arbeiða og fólkini her eru ófør.

Uppá fyrispurning hvussu hann heldur umstøðurnar eru á Skálafjørðinum eisini at hýsa eini framtíðar útgerðarstøð, sum kann veita vørur og tænastur til eina útbygging av møguligum oljufundum sigur norðmaðurin, at tá eru krøvini til eina slíka havn nógv størri. Tá verður neyðugt at finna eitt stað burtur frá bygdum øki, og har tað er stórt pláss til tangar og alla ta útgerð, sum ein útbygging krevur. Hann heldur tað vera eina góða kombinatión at hava ein oljubasa í nánd av eini skipasmiðju.

Hoyrið norska skiparan í endursendingini á Rás2 leygarmorgun millum klokkan 10 og 12.

*jan@sosialurin.fo*



*Geir Ytreland, skipari á Viking Lady, sum er megin-œðrin millum Runavík og boripallin West Phoenix*
*Mynd Jan Müller*